Heini O. Heinesen:

# Vit mugu fylgja við

**– Tað er onki í vegin fyri at broyta hernaðarsamtyktirnar, heldur aldursforseti og formaður Tjóðveldisfloksins á tingi**

HERNAÐARSAMTYKTIR
*Áki Bertholdsen*

– Tíðir broytast og tað er neyðugt at fylgja við.

Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi, og elsti tingmaður floksins, er samdur við teimum sum halda, at tað er rætt at broyta hernaðarsamtyktirnar hjá Føroya Løgtingi.

Hernaðarsamtyktirnar siga í stuttum, at Føroyar skulu haldast uttanfyri alt hernaðarligt virksemi og júst hesar samtyktir hava allar dagar verið eitt av fremstu hjartamálum hjá tjóðveldisflokkinum, sum hann ikki undir nøkrum umstøðum hevur viljað vikið frá.

Men nú í eina tíð hava vit varnast, at flokkurin hevur vent í hesum máli. Ikki minst hava tær yngru kreftirnar í flokkinum lufta tankan um at støðan í hernaðarmálinum var ikki so avgjørd longur.

Heini O. Heinesen er ein av tí eldra ættarliðnum í flokkinum. Hann er elsti tingmaður floksins og við sínum 18 árum á baki í tinginum, er hann eisini tann tjóðveldismaður, sum hevur sitið longst á tingi av teimum, sum nú manna flokkin.

Hann kom á ting í 1984 sat á tingi, tá ið kalda kríggi herjaði sum harðast og Tjóðveldisflokkurin tvíhelt sum fastast um hernaðarsamtykirnar.

Síðani hevur hann sitið á tingi út í eitt. Og eisini hann heldur, at tað er rætt at flokkurin skiftir støðu í hernaðarmálinum.

### Politikkurin má broytast

–Tíðirnar eru nógv broyttar seinastu árini og tað er neyðugt at politikkurin eisini broytist so at hann samsvarar tíðini, sigur aldursforsetin hjá tjóðveldisflokkinum.

Hann vísir á, at kalda kríggi, sum vit kenna tað, er av og tað ikki longur er ein samanbrestur ímillum eystur og vestur, sum er størsta hóttanin ímóti mannaættini.

– Nú á døgum er figgindin ein heilt annar. Nú er yvirgangur okkara størsta hóttan og í mongum førum ikki so frægt sum vita vit, hvør fíggindin er.

Tí heldur Heini O. Heinesen, at tað er rætt at endurskoða hernaðarsamtyktirnar.

– Eg haldi framvegis, at vit skulu halda okkum uttanfyri alt hernaðarligt virksemi sum so. Men í mongum førum er tað ikki júst tað, sum er spurningurin. Og kunnu vit gera nyttu í stríðnum ímóti yvirgangi, eiga vit ikki at skáka okkum undan, heldur hann.

–Er ætlanin at gera eina heimsumfatandi eftirlitsskipan, sum m.a. skal brúkast í stríðnum ímóti yvirgangi, er tað ein spurningur um vi kunnu loyva okkum at sýta fyri at vera við so at vit koma at vera atvoldin til, at eitt stórt hol verður í hesi eftirlitsskipan, sigur formaður tjóðveldisfloksins á tingi.

Við hesum sigur Heini O. Heinesen ikki, at hann tekur undir við ætlanini, sum nú er frammi um útbyggingar í Føroyum.

–Tað eru vit ikki før fyri at taka støðu til, tí vit vita alt ov lítið um, hvat hon inniber. Tað mugu fleiri upplýsingar á borðið, áðrenn vit kunnu taka støðu. Og tað er júst hetta, sum uttanlandsnevndin hevur boðað løgmanni frá, sigur hann.

Hvussu við NATO- limaskapi?

Tá ið vit eru blivin sjálvstøðug tjóð, kann tann spurningurin takast til viðgerðar. At vera limur í NATO sum partur í danska ríkinum, har danska stjórnin umsitur limaskapin fyri okkum, førir bara til illgrunasemi, misnøgd og illgitingar.

– Tað hava vit eittt skúladømi um í hesum málinum, sum nú er frammi um ætlaðu útbyggingarnar , har danski forsætisráðharrin ikki vil svara spurninginum um, hvat hendir um føroyingar ikki vilja loyva útbyggingini, sigur Heini O. Heinesen.



*–Seinastu tíðina hava nógv tjóðveldisfólk kúvent í spurningin um hvønn leiklut Føroyar skulu hava á hermálsliga økinum. Politikkurin má sjálvsagt endurskoðast so hvørt, tíðirnar broytast, sigur Heini O. Heinesen, elsti tjóðveldismaður á tingi*

# Mugu hava skrivstovu at røkja áhugamálini hjá útoyggjunum

**– Útoyggjafelagið hevur nú søkt um at koma á fíggjarlógina fyri komandi ár, so at felagið kann seta fólk í starv**

ÚTOYGGJAFELAG
*Áki Bertholdsen*

– Skal Útoyggjafelagið vera til nakra veruliga nyttu, mugu vit hava eina skrivstovu.

Tað heldur formaður felagsins, Óla Jákup úr Dímun.

Hann sigur, at tí hevur felagið sent landsstýrinum umsókn um at fáa eina upphædd á fíggjarlóg Løgtingssins fyri 2003

–Umsóknin er sent Eyðuni Elttør, landsstýrismanni í útoyggjamálum, og vónandi verður hon viðgjørd við vælvild.

Óla Jákup úr Dímun sigur, at tað er neyðugt hjá felagnum at hava eina skrivstovu og eitt fólk í løntum starvi, skal tað eydnast at gera eitt veruligt arbeiði til frama fyri útoyggjamenningina.

Tað, sum Útoyggjafelagið hevur søkt um, er 300.000- 400.000 krónur til eina skrivstovu og eitt starvsfólk, sum kann arbeiða ein part av tíðini fyri felagið.

–Olga Biskupstøð hevur verið samskipari, tá ið felagið varð fyrireikað og hon hevur gjørt eitt megnararbeiði.

–Men nú fær hon ikki samsýning, men kortini hevur hon gjørt eitt stórt arbeiði fyri felagið.

– Men tað ber ikki til at dúva uppá sjálvboðið arbeiði í longdini, so skal tað eydnast okkum at fáa nakað veruligt á skaftið, mugu vit fáa skipað viðurskifti við einum skrivstovufólki í einum parttíðarstarvi.

Hann vísir á, at tað er ómetaliga nógv at seta seg inn í og tað er so mikið krevjandi, at tað er neyðugt at hava útbúgvið fólk til tað.

Fyrrenn tað er greitt, at felagið fær stuðul á fíggjarlógini, hevur felagið ikki hugsað um, hvar ein slík skrivstova skal vera.

Formaðurin í felagnum sigur, at í næstum fer umboðsráðið hjá felagnum at hittast at taka støðu til, hvørji mál, felagið skal taka upp og hvussu málini skulu raðfestast.

*– Tað er so mikið nógv at tríva í, at tað er neyðugt at vit fáa fólk í parttíðarstarv at arbeiða fyri Útoyggjafelagið, sigur Óla Jákup úr Dímun, formaður í felagnum*





# Sjómenn fáa ikki heilsuváttan í Klaksvík

**Síðani báðir kommunulæknarnir fóru í summarfrí, hevur tað ikki borið til hjá sjómonnum at fáa eina heilsuváttan ella at fáa hana endurnýggjaða í Klaksvík. Hetta tí, at ein nýggj lóg sigur, at allir læknar, sum kunnu útvega eina heilsuváttan, skulu hava eina góðkenning frá Sjóvinnufyrisitingini**

HEILSUVERKIÐ
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Henda nýggja lógin sigur, at læknar skulu hava eitt ávíst skeið fyri at kunna útvega sjómonnum eina heilsuváttan.

Hetta førir so við sær, at sjómenn úr Klaksvík noyðast at leita til læknar aðrastaðni í landinum fyri at fáa ta neyðugu heilsuváttanina. Stutt eftir, at báðir kommunulæknarnir í Klaksvík vóru farnir í summarfrí, fekk ein ungur drongur skipsboð. Hann fór so til kommunlæknan fyri at endurnýggja heilsuváttanina, men hann fekk sum vátan vøtt, tá tað bleiv gjørt honum greitt, at tað kundi ikki lata seg gera í Klaksvík, tí at teir báðir donsku avloysararnir ikki høvdu nakra góðkenning frá Sjóvinnufyrisitingini, sum heimildaði teimum at útvega eina heilsuváttan.

Hesin drongurin skuldi ikki avstað fyrr enn dagin eftir, so hann fór til Gøtu. Og har fekk hann ta neyðugu váttanina. Men um hann nú hevði fingið boð um at skula avstað sama dag, so er tað ikki vist, at tað hevði borið til hjá honum at fingið heilsuváttan. Og so hevði hann helst ikki sloppið avstað.

Onkur helt fyri í hesum, at tað er ófatiligt, at ein fiskivinnubýur, sum Klaksvík ikki skal kunna útvega sínum sjómonnum tey neyðugu skjølini, sum skulu til fyri, at teir kunnu fara til skips.

### Danskir læknar góðkennast

Maria á Dul, sum umsitur kommunulæknar í Almanna- og Heilsumálaráðnum sigur við Sosialin, at tað hevur verið arbeitt við at fáa teir donsku avloysararnar, sum koma til landið inn undir ta nýggju lógina, sum krevur, at ein góðkenning frá Sjóvinnufyrisitingini skal til fyri at ein kommunulækni kann útvega ein heilsuváttan. Men hetta er so ikki eydnast enn. Og verður tað tískil heldur ikki í ár, tí nú er summarfrtítíðin við at vera av.

– Men eg ætli mær at arbeiða fram í móti at vit fáa eina loysn á hesum til næsta ár, soleiðis at teir donsku avloysararnir eisini kunnu útvega heilsuváttanir í Føroyum, sigur Maria á Dul.

Hon vísir á, at tað skuldi sum so ikki verið nakar trupulleiki, tí allir teir donsku avloysararnir, sum koma til Føroya í summarfrítíðini eru praktiserandi læknar niðri, og har hava teir so ta neyðugu góðkenningina.

– So skuldi tað ikki verið so torført at fingið teir inn undir ta føroysku góðkenningina, heldur Maria á Dul. Hon sigur, at hon fer at tosa við Sjóvinnufyrisitingina um, tað er nakar máti at fáa danskar avloysarar undir ta nýggju lógina.

### Tríggir kommunlæknar

Tað eru fýra kommunulæknastørv í Klaksvík, men í løtuni eru bert tvey av teimum sett. Tað hevur verið sera trupult at fáa ein kommunulækna í tað triðja starvið, sum nú hevur verið leyst í nøkur ár. Men Maria á Dul sigur, at tað nú er ein góður møguleiki fyri, at tað starvið verður sett í oktobur ella novembur. Og so verða tað aftur tríggir kommunulæknar í Klaksvík.

– Eg kann ikki siga nakað við vissu enn, men í løtuni sær tað positivt út.

– Tað fjórða kommunulæknastarvið verður ikki sett so longi ongi høli eru til taks. Tað er ábyrgdin hjá kommuni at syrgja fyri hølum. Og so longi ongi eru, so verður tað ikki søkt eftir einum fjórða kommunulækna, greiðir Maria frá.

Men sum nú er, so eru tað tveir danskir avloysarar til arbeiðis á kommunulæknaskrivstovunum í Klaksvík. Annar kommunulæknin kemur aftur nú í septembur, meðan hin ikki verður aftur fyrr enn í novembur, og kemur avloysari at verða í hansara stað til ta tíð.

Men ta tíð verður so ein føroyskur kommunulækni við góðkenning frá Sjóvinnufyrisitingini at útvega sjómonnum í Klaksvík heilsuváttan kortini.





*Myndatekstur: Sjómenn kunnu ikki fáa eina heilsuváttan í Klaksvík, so longi sum danskir avloysarar sita sum kommunulæknar, tí teir ikki hava eina góðkenning frá Sjóvinnufyrisitingini*

## Tíðindafólk vitja í Norðoyggjum

**Fríggjadagin klokkan hálvgum trý koma úti við 20 tíðindafólk til Klaksvíkar. Hetta eru limir í Club Føroyar, sum hava vitjað í Føroyum fyrr. Tey hava millum annað verið í Suðuroy og Streymoy. Og hesuferð gongur so leiðin í Norðoyggjar**

VITJAN
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Sum Sosialurin skilir, so koma tíðindafólkini higar at eygleiða. Og fara tey so at skriva um eitthvørt, sum tey halda vera áhugavert. Fyri einum tveimum árum síðani vóru tey í Suðuroy, og tá skrivaðu tey nógv áhugavert um oynna. Bæði gott og ringt.

Tá tey koma til Klaksvíkar fara tey fyrst at vitja millum annað Norðoya Fornminnissavn, Christianskirkjuna og frítíðarplássið úti í Grøv, áðrenn leiðin gongur til Viðareiðis, har tey skulu gista á Hotel Norð.

Leygardagin fara tey um tað viðrar við Alfa Pilot til Svínoyar, har ætlanin er at ganga úr bygdini á Svínoyar Eiði.

Síðani sigla tey runt um Fugloynna, áðrenn tey fara aftur til Hvannasunds. Hagani gongur leiðin við bussi til Kunoyar, har tey fara at vitja viðarlundina og kirkjuna.

Frá Kunoynni gongur leiðin við Alfa Pilot yvir á Syðradal ella Húsar á Kalsoynni og har frá við bussi norður til Mikladals og Trøllanes. Leygarkvøldið fara tey so at eta døgurða í Klaksvík.

Ferðalagið fer úr aftur Føroyum sunnudagin.

Tað er Norðoya Kunningarstova, sum hevur verið við til at fyrireika ferðina hjá Club Føroyar og at leggja skránna hjá teimum til rættis.

